DAGSINS MEINING

Stríð um land

Stríðið millum ísraelar og palestinar tykist onga enda at fáa. Tað stendur við og harðnar. Hetta stríð er ein endaleys hevnd, har báðir partar gerast taparar. Skal tað fáa ein enda, má onkur gevast. Men higartil hevur tað víst seg, at hvørgin vil gevast við sínum hevndaratsóknum. Alt ov mong ósek menniskju hava latið lív í hesum bardaga, sum eisini er ein hóttan móti heimsfriðinum.

ST-felagsskapurin, sum má metast at vera ein óheftur og neutralur felagsskapur, hevur heitt á báðar partar um at gevast. Fleiri friðarroyndir eru gjørdar. Ísraelski leiðarin Sharon vil ikki hoyra talan um friðarroyndirnar hjá ST, ið snúgva seg um kjarnuna í málinum og ikki bara avleiðingarnar. Og kjarnin er, sum ST-umboðsmaðurin Terje Rød Larsen gjørdi greitt í sjónvarpi í gjár, at fyri at fáa frið má Ísrael gevast við nýggjum búsetingum og lata palestinum aftur øki teir hava hersett og bygt upp nýggjar búsetingar. Hetta er eisini tað sum fleiri eitt nú amerikanskir semingsmenn hava gjørt greitt.

Neyvan nakar, ið vísir á hetta, tekur undir við palestinsku sjálvmorðsatsóknunum og øðrum atgerðum móti ísraelum. Men ísraelska stjórnin hevur ikki loyvi til at venda deyva oyrað til, tá altjóða friðarsemingsmenn og stovnar sum ST biðja hana um at gera nakað við spurningin um hersett land. Tí má tað koma eitt útspæl frá Ísrael um, at tað vil viðgera henda spurningin aftur í størsta álvara. Palestinar hava eins og ísraelar sín fulla rætt til land. Hetta er tað málið snýr seg um.

Og her er tað, at USA misrøkir sínar skyldur. Ístaðin fyri at ganga inn fyri eini herðing av hevndaratsóknunum móti palestinum, átti USA at tvingað Sharon til samráðingarborðið. At fingið hann at góðtikið tær mongu friðarætlanir, sum bæði amerikanarar sjálvir og onnur hava tilevnað – og sum allar greitt siga, at ísraelska stjórnin má geva landaøki frá sær aftur. Soleingi einki verður gjørt við tað kunnu vit rokna við, at palestinskir bólkar fara at gera um seg.

Tað syndarliga er, at víðgongda støðan hjá ísraelsku stjórnini hevur fingið eisini hóvligar palestinar at fara upp í stríðið. Hon hevur bara gjørt ilt verri. Sum ein av búskaparligu stuðlunum hjá Ísrael eigur USA tí at kenna sína ábyrgd og leggja trýst bæði á palestinar og á Ísrael at fara aftur til samráðingarborðið. Tað er eingin onnur loysn. Í síðsta enda kann hevndin gerast so øgilig, at hon kann ávirka sjálvan heimsfriðin. At USA hevur viljað brúkt pengar, fólk og orku til at niðurberja terrorvirksemi er gott, men tá kann tað ikki standa og hyggja at, meðan ísraelskir stríðsvognar og flogfør bumba palestinar og palestinskar búsetingar sundur og saman. Eingin kann heldur góðtaka palestinsku drápini. Men fyri at steðga hesum høpisleysu drápum mugu vit til kjarnuna, orsøkina, og hon er hersett land.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kleptokrati

Dan Reinert Petersen
javnaðarmaður

Yvirskriftin er eitt fremmandaorð, ið merkir ein stýrisform, har stjórnin stjelur fólksins pengar. Hetta kundi mint á suðurameríkansk viðurskiftir, t.d. í Argentina. Men okkum nýtist als ikki at fara so langt at leita eftir hesum fyribrigdi.

Stutt undan jólum samtykti samgongan eina figgjarlóg, sum í útgangsstøði gav hall, tí samgongumenn í nationalistiskari fáfongd høvdu skorið blokkin við 366 mill. kr. Einans 15 tinglimir atkvøddu fyri hesum stóra niðurskuri. 15 føroyingar avgjørdu, at vit øll skuldu gerast 366 mill. kr. fátækari í ár og mong ár fram.

Samgongumenn hava tvíhildið um, at fullveldið onki skuldi kosta. Men hvat kundu vit fingið fyri hesar 366 mill? Vit kundu t.d. nøktað allan ellis- og røktarheimstørvin, eini 400 stovnspláss í ár og goldið alt kontant. Vit kundu eisini hækkað fólkapensiónirnar fleiri túsund kr. um mánaðin, uttan at hetta varð figgjað yvir skattin. Tann nýggi Smyril, sum nú skal byggjast og kemur at tyngja fleiri figgjarlógir fram, kundi verið koldin kontant. Nýtt skip, pengarnar í hondina. Ger so væl!

Planir eru um at gera undirsjóartunnil millum Leirvíkina og Norðoyar. Eitt sløð av pengum varð sett av til endamálið við eini eykajáttan seinasta ár, men onki oyra er sett av til verkætlanina á figgjarlógini í ár. Pengar vóru snøgt sagt ikki til tað. Varðveittu vit blokkin á sama støði, sum henda samgonga tryggjaði sær alt skeiðið, kundu vit sett á at bora til Norðoyar tann dag í dag. Og tá tunnilin var liðugur, var hann goldin allur sum han var, og vit høvdu enntá sloppið undan bummpengum.

Her eru bara nøkur hugskot, hvussu Javnaðarflokkurin hevði húsast, um vit sótu við ræðið.

Øll hesi stórmál høvdu sjálvandi ikki verðið nádd eftir einum ár sjálvandi. Men eftir 4 árum tvs. einum valskeiði vóru øll hesi mál nádd. Uttan at tað nervaði skattaborgaran ella landskassan við einum oyra.

Tað er ein undarlig kensla, man situr við, at vita sær at vit hava eitt stýri, sum miðvíst rekur ein politikk, sum ger tað trengri hjá borgaranum, tí teir tóku 366 mill. kr. frá okkum.

Er ikki tíðin komin, at vit geva teimum fótin eitt ávíst stað?

Nærbygdirnar

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Havnin er nógv vaksin seinastu árini. Bæði í vídd og fólkatali. Tað er sjálvsagt spell, um Føroya fólk burturav verður eitt býarfólk og missir sambandið við bø og haga, sjógv og djóralív. Vit hava øll gott av at vera eitt sindur bygdarlig. Tí er umráðandi at vit geva fólki, sum at kalla einans hava møguleika at arbeiða í Havn, møguleikan at búgva á bygd.

Nólsoyggin er ein fyrimynd í so máta. Hóast alment ein útoyggj, hava fólk í Nólsoy gott samanhald og hava enntá varðveitt eitt serligt bygdarmál. Tað er ongin ivi um, at tað ber væl til at vera stovnsleiðari í Havn og samstundis búgva í Nólsoy.

Fleiri aðrar bygdir eru í Suðurstreymi, sum kunnu geva fólki tað lívsinnihald, sum bygdaumhvørvið gevur. Hestur, Norðradalur, Syðradalur, Hvítanes og Kaldbak eru sannar perlur.

Men Nólsoy og Hestur og bygdirnar Syðradalur og Norðradalur hava serligan samferðslutørv. Vit mugu tryggja okkum, at landið ger sín part av tí, sum skal til á tí økinum.

Landið skal syrgja fyri, at hestmenn og nólsoyingar sleppa til arbeiðis í Havn sum øll onnur. Har má ongin slingur vera í valsinum, og landið má eisini tryggja vegirnar til Syðradals og Norðradals.

Landið má selja kommununi jørð til bæði útstykkingar og traðir í hesum bygdum, so tað verður møguligt at búgva og trívast í hesum bygdum, sum samstundis eru útjaðari og partur av nærumhvørvinum hjá Havnini.

SU nýtt valevni í Suðurstreymi

Vegna nevndina í SU
Kristoffur Gaardlykke, formaður

Á uppstillingarfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag í farnu viku valdi Sosialistiskt Ungmannafelag at stuðla Katrini Gaard. Nú hon seinni hevur tikið seg av listanum, er hetta hennara egna avgerð. Nevndin í Sosialistiskum Ungmannafelag hevur fleiri ferðir heitt á Katrina Gaard um ikki at taka seg av listanum, men hennara støða er endalig. Hetta harmast vit um, men taka tað til eftirtektar, og tí hevur felagið avgjørt at skjóta Bartal Nolsøe Poulsen upp sum valevni á komandi uppstillingarfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Sosialistiskt Ungmannafelag vónar, at limirnir hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag taka hetta til eftirtektar og stuðla Bartal Nolsøe Poulsen sum umboð fyri SU.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult nav skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hoydal og Heimastýrislógin

Heimastýrislógin nú svarið up pá viðurskiftini Føroyar og Danmarkar millum?

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

Í útvarpssamrøðu mánakvøldið nýtti Høgni Hoydal møguleikan at niðurgera uppskotið um smidligari og lagaligari tilgongd Føroyar og Danmarkar millum. At HH so eisini nýtti høvið at bera fram ósannindir og annars at speireka undirritaða – ja, tað skal hesaferð fara aftur við borðinum.

Uppskotið um broyttu karmarnar, ein samveldisskipan, hevur eittans endamál: At avgerðirnar um framtíðarstøðu okkara verða hjá Løgtinginum og Føroya Fólki.

Hetta hóvar ikki HH, sum heldur vil halda fram undir heimastýrisskipanini, har neyðugt verður við ótaldum samráðingarumførum, so hvørt einstøku málsøkini verða yvirtikin. Men tað er kanska júst í samsvari við politikkin hjá HH, tí tá verða samráðingarúrslitini altíð treytað av danskari vælvild/illvilja hjá skiftandi donskum stjórnum. Sostatt fer áhaldandi at bera til at kóka politiska súpan upp á viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum – valskeið aftan á valskeið....

Úr leysum lofti

Í somu viðtalu pástendur HH, at uppskotið hjá undirritaða limar okkum inn í danska ríkið. Hetta er sjálvsagt tikið úr leysum lofti. Øll, sum hava minsta skil fyri ríkisrættarligu viðurskiftunum vita, at henda niðurstøða er púra burturvið og vísir bert, hvussu ósakligur HH er, tá samanum kemur.

Og so páhaldið hjá HH um, at samtyktin um Sjálvstýri Føroya Fólks er størsta fullveldisstigið?! Hvussu kann HH sleppa – uttan viðmerking, at bera fram slíkan pástand, tá løgtingssamtyktin bert er áheitan á landsstýrið um at yvirtaka málsøki eftir heimastýrislógini og at málsetningurin longu er brotin, tí bert eitt av tíggju málum, sum skuldu yvirtakast ársskiftið 2001/02, er komið undir føroyskt málsræði? Og ikki minst, so binda løgtingssamtyktir bert í tí valskeiði, tær eru samtyktar!

Men hvussu sær samveldisuppskotið so út:

1. ***Føroyska heimastýrið kann gera av, at øll málsøki, undantikin uttanríkismál, verjumál, ríkisborgararættur og gjaldoyramál, kunnu yvirtakast sum føroysk sermál við teirri fylgju, at heimastýrið tekur uppá seg tær útreiðslur, ið fylgja við teimum.***
2. ***Heimildirnar hjá Landsstýri og Løgtingi í uttanríkismálum verða víðkaðar til at umfata altjóða sáttmálagerðir viðvíkjandi yvirtiknum málum og medavgerðarætti í øllum málum, sum viðvíkja Føroyum.***
3. ***Tekur Føroya fólk avgerð um, at Føroyar verða sjálvstøðugar, koma málsøkini uttanríkismál, verjumál, ríkisborgararættur og gjaldoyramál undir føroyskt málsræði.***
4. ***Danska stjórnin boðar altjóða samfelagnum frá nýggja sáttmálanum.***

Uppskotið er beinleiðis týðing av yvirlýsingini frá 14. januar hjá løgmanni og forsætismálaráðharranum.

Lagt er upp til einfaldan og smidligan karm, har avgerðirnar um framtíðarstøðu okkara verða tiknar av føroyingum og ikki av dønum. Forðað verður sostatt fyri, at skiftandi danskar stjórnir fara at hava møguleika at leggja føtur fyri ynski úr Føroyum um yvirtøkur. Talan er um skipan, sum tekur av heimastýrislógina og sum setur tilgongdina millum Føroyar og Danmark á skinnarar – einvegis, og sum føroyingar ynskja tað.

Onnur avleiðing er, at tær fýra dimensiónirnar í føroyskum politikki verða sjóðaðar niður í tvær, nevniliga høgra og vinstrapolitikk.

Hetta uppskotið slær HH upp í glens, kanska í ómegd, ella tí at HH trýr meiri uppá 7-málabroytingar innan heimastýrislógina, har danir hava seinasta orðið?!

HH hevur avdúkað, at hann onga loysn eigur upp á viðurskiftini Føroyar og Danmarkar ímillum, uttan - heimastýrisskipanina. Nú er soðið vorðið tunt - nevndi nakar nýggju klæði keisarans?

Tvær lýsingar

Hvítabók um samveldi: felagsheiti fyri ymisk sløg av ríkjum, ríkjasambondum og sambandsríkjum,ið hava tað til felags, at tey í sjálvum grundstøðinum (t.d. í stjórnarskipanini ella í altjóðarættarligum sáttmála) eru samansett av meira ella minni sjálvstøðugum umveldum. Dømi eru m.a. Ísland- Danmark 1918-1944 og USA. Og Ensk-Føroyska orðabókin (Stiðin) um Commonwelth: Tjóðveldi, lýðveldi. Og um The British Commonwelth of Nations = Bretska Samveldið.

Møguleikarnir fyri starvi í oljuvinnuni

Broytingarnar í skattalógini eru við til at forða ágrýtnum føroyingum í at nema sær kunnleika innan oljuvinnuna í altjóða høpi

Leila á Lofti
chess@post.olivant.fo

Tað hevur seinastu árini verið nógv tosað í fjølmiðlunum,millum vinnulívsfólk og politikarar, at føroyingar mugu fyrireika seg til oljuvinnuna, sum eftir øllum at døma fyrr ella seinni kemur til Føroyar.

Vit hava eisini hoyrt, at vinnan skal brynja seg til at taka lut í oljuvinnuni og sostatt vera klár, tá tann tið kemur.

Eg siti tí eftir við spurninginum , hví tað ikki er tikið hædd fyri tí einstaka føroyinginum, sum av ágrýtni, fer út um landoddarnar at søkja sær starv innan henda ídnað,eg hugsi serliga um størv umborð á boripallum og boriskipum.

Sum ivaleyst nógvir føroyingar av egnum royndum longu vita, er hendan vinnan ikki tað lættasta staðið, at "fáa fótin innum", tí tú sum einstaklingur neyvan hevur tær røttu kontaktirnar.

Tað er nú eina ferð soleiðis ,at ein umsøkn uttan "andlit" sum oftast endar niðast í bunkanum hjá einum arbeiðsgevara. Men hvussu hjálpa vit so tí einstaka føroyingurin?

Tað kann í hvussu so er ikki vera við at viðkomandi sjálvur má gjalda ferðina aftur og fram til arbeiðis.

Í Bretlandi, til dømis, skal arbeiðsgevarin gjalda ferðaseðilin við toki frá bústaði og til Aberdeen, hagani tyrlan flýgir út til boripall ella boriskip, og hvar stand by- og supply bátar sigla út frá.

Sum kunnugt er einki tok úr Føroyum til Aberdeen, men arbeiðarin má nýta flogfar til og frá arbeiði, sum arbeiðsgevarin (útlendska oljufelagið/veitingarfelagið) aloftast ikki vil gjalda, tá velur hann heldur at seta ein breta í starv.

Í dag ber heldur ikki til, eins og tað gjørdi áðrenn 01.01.2001, at fáa skjalprógvaðar ferðaútreiðslur sum frádrátt í skatti í Føroyum. Hetta valdi figgjarmálastýrið at broyta, sambart kunngerð nr. 120 frá 22 desember 2000, so sjófólk fáa ein samdøgurfrádrátt áljóðandi 300 DKR. Hetta er ein frádráttur sum verður givin procentvís av teimum 300 krónur um dagin so ljóðandi:

Frítt innivist	20%
Kostur	50%
Ferðing	25%
Tryggingar	5%

Fullur samdøgurfrádráttur verður bert goldin, um viðkomandi persónur sjálvur hevur goldið fyri kost, innivist, ferðaútreiðslur og tryggingar í samband við arbeiði uttanlanda. Hevur onkur føroyingur fingið starv á tíl dømis einum boripalli, so verður innivist, kostur og tryggingar goldið av arbeiðsgevaranum,eftir eru nú 25% av 300Dkr .- sum er 75 Dkr.

Eisini kann nevnast, at arbeiðsgongdin í Bretlandi oftast er 14 dagar umborð og 14 dagar heima(ferðin aftur og fram fer av frídøgunum), so fyri ein túr, tvs. fyri ein mánað, er skattafrádráttturin 1050 Dkr. Flogferðaseðilin til Aberdeen kostar neyvan so lítið .....

Hetta er tað sama sum at taka tað økonomiska grund arlagið frá einum og hvørjum, sum ætlaði at royna at fáa sær „fótin innum" í oljuvinnuni.

Sum um hetta ikki var nóg oyðileggjandi, so avgjørdi fíggjarmálastýrið enn eina ferð at lækka samdøgurfrádráttin, niður á 100 Dkr, tað vil siga, at áður nevnda dømi vildi farið niður á 350 Dkr at draga frá í skatti um mánaðin.

Nevnast má, at her er talan um ein frádrátt í bruttoinntøkuni og ikki ein stuðul, eins og tað er , tá ein persónur ferðast millum bústað og arbeiðsstað í Føroyum, sambart kunngerð nr.103 frá 28 juni 2001.

Dømi:
Arbeiðið í bretskum sjógvi 180 dagar um árið :
4.500,00 kr í frádrátti

Suðuringur til arbeiðis í Havn 170 dagar um árið:
5.100,00 kr. í stuðli

Hetta kann ikki vera rætta leiðin at hjálpa teimum føroyingum,ið hava viljan og ágrýtni til at fáa sær tann kunnleika og tann førleika, ið eisini skal til, fyri at vit kunnu taka ímóti hesu vinnu, væl at merkja, um vit ynskja, at føroyingar skulu fáa arbeiði.

Vit mugu heldur ikki gloyma, at her er ein møguleiki at fáa "útlendskan valuta" til Føroyar og tann stóri spurningurin er tískil, um kunngerð nr. 120 frá 22. desember 2000 frá Fíggjamálastýrinum vil elva til vinning ella tap.

Eg vil enda við einum broti úr samgonguskjalinum, har um oljuvinnuna stendur:

Tryggjast skal, at eitt komandi leitingarumfar og ein møgulig oljuvinna, fyrst og fremst verður grundarlagið undir at menna førleika í føroysku vinnuni í altjóða høpi, so hon kann tillaga seg broytingar og menna nýggjar inntøkumøguleikar.

Sosialurin
Í Býin
- hvønn hósdag